# Orkestrið druknaði men Lena lýsti

**Summar Festivalurin byrjaði fríggjadagin við hornorkesturtónleiki, sum druknaði í larmandi klovnaundirhaldi. Men síðani hertók Lena Anderssen Torgið og vísti, hví hon er stjørna**

SUMMARFESTIVALUR
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Eitt skúlaorkestur úr norsku bygdini Godøy hátíðarhelt 30 ára føðingardag við at luttaka á føroyska Summar Festivalinum. Orkestrið hevði vitjað í Klaksvík, táið tað varð stovnað, og nú vóru tey komin aftur til staðið, har tey byrjaðu.

Orkestrið var væl mannað við bæði vaksnum og børnum, og tey spældu fínt. Men fáu áhoyrarnir, sum vóru komnir at lurta, máttu kíta seg fyri at hoyra tónarnar frá norska orkestrinum.

Fyrst druknaði orkestrið í ljóðroynd hjá Mel C, og síðani byrjaði undirhaldið í Silvalandinum við nøkrum alt-annað-køvandi sambarútmum frá 80unum. Synd, at eitt stórt orkestur kemur heilt úr Noreg til Klaksvíkar fyri at druknað í larmandi klovnaundirhaldið.

Tað er sjálvandi partur av festivalkonseptinum, at tú kanst ganga frá einari konsert til aðra, og frá einum ljóðlandi til annað, men hetta riggaði ikki á Torginum fríggjadagin. Orkestrið hevði ongan kjans.

### Hjarta í tónleikinum

Tá ið Lena og Niklas byrjaðu at gera klárt til teirra framførslu beint aftaná, var Torgið manntómt og sambarútmurnar frá Silvalandinum buldraðu framhaldandi. Tíbetur stegðaði klovnaframførslan tó, og sterka røddin hjá Lenu dróg fólk til pallin.

Framførslan var framúr, og tá ið konsertin var liðug, var Torgið fult av fólki, sum klappaðu parið upp aftur til eyka nummar.

Lena sang og dansaði, sum stóð hon frammanfyri einum stórum havi av menniskjum, sum øll dansaðu við tendraðum ljósum, heldur enn frammanfyri stillum og smædnum áhoyrum, sum hon í veruleikanum gjørdi. Samstundis var samanspælið millum hana og Niklas sum altíð so erligt og opið, at tað var sum at vera til eina lítla intimkonsert.

Løgini hjá Lenu og Niklas eru øll hitt-løg, og Lena er ein eminentur sangari, ein stjørna. Men tað sum undirritaða helt vera mest hugtakandi á konsertini hendan hálvkalda festivaldagin var samanspælið millum Lenu og Niklas. Við tveimum guitararum fyltu tey rúmið millum Klakk og Kjøl, sum vóru tey eitt heilt orkestur, samstundis sum tey vóru so samansjóða, at tað var sum høvdu tey bara ein hjartasláttur. Flott.



*Við tveimum einsamøllum guitarum fyltu Lena og Niklas rúmið millum Klakk og Kjøl, sum vóru tey eitt heilt orkestur, samstundis sum tey vóru so væl samanspæld at tað var sum vóru tey bara ein persónur*

# Faroe 5 fangaðu fjøldina

**Við fleiri fangandi løgum og einum veruligum summarhitti fangaðu Faroe 5 fjøldina við einari góðari framførslu á Torginum**

SUMMARFESTIVALUR
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Fyrsti sangurin við Faroe 5 var yvirhøvur miseydnaður. Men hetta var ikki teirra feilur, men vánalig fyriskipan. Tá Anna Nygaard fór av palli umleið 25 minuttir áðrenn Faroe 5 skuldu á pall, stóðu tær klárar at leypa upp á pallin at gera ljóðprøvar, men av eini ella aðrari orsøk høvdu tær ikki verið á palli og gjørt ljóðprøvar klokkan 20.30, tá tær skuldu á pall. Av tí sama máttu áhoyrarnir bíða eina góða løtu, meðan tær gjørdu ljóðprøvar.

Av tí sama miseydnaðist fyrsti sangurin fullkomiliga. Torført var at hoyra tær, og generelt var ljóðið einki serligt. Men hetta fingu tær tó bøtt uppá, tá tær beint eftir borðreiddu við teirra stóra summar hitti "Bara eitt spæl", og fjøldin elskaði tær fyri tað. Við fleiri góðum eftirfylgjandi løgum fingu tær lív í fjøldina aftur, og ter undirhildu áhoyrarunum væl og virðiliga.

Eitt, ið tó kundi verið betri, var sjálvsálitið hjá teimum. Til tíðir virkaðu røddirnar hjá teimum sera veikar, og torført var at fanga veruligu útstrálingina í framførsluni. Havast skal tó í huga, at tær enn eru sera nýggjar á føroyska tónleikapallinum, og at tær enn ikki eru vanar at framføra fyri størri fjøldum.

Áhoyrarnir til hesa konsertina vóru sera nøgvir hóast alt, og samanumtikið fingu teir gott undirhaldsvirði. Um hugsað verður um ljóð, undirhaldsvirði og málbólk megnaðu tær við hesari konsertini at liva upp til tað, ið væntast kundi av teimum. Áhoyrarnir tóku tær til sín, og tað sá út til at tær elskaðu at standa á palli og undirhalda.

Samanumtikið ein góð konsert, ið tó kundi verið betri, um ein hugsar um sjálvsálitið hjá teimum og fyriskipanina.

*Hóast eina trilvandy byrjan, reistu Faroe 5 seg væl aftur við »Bara eitt spæl« og øðrum góðum løgum*



# Ja, tú ert William



**Bet You Are William høvdu frálíka konsert í Flagstjaldinum Petur Háberg hevur fingið sar listaheitið Bet You Are William.**

SUMMARFESTIVALUR
*dagfinn@sosialurin.fo*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Hesin bólkur av ungum úrmalingum vil nakað og duga. Stór fjøld hevði leitað sær í Flagstjaldið at hoyra tað, sum eg fyrst helt vera kristnan popp, men sum eg staðfesti er kristin rockur.

Hetta er nútímans rockur, ið er trúgvur mótvegis tí, ið fyri er slóðað. Og karisma og image eru eisini í ordan, so bólkurin hevur heilt víst møguleikar.

Góð framførsla, valspælt, og fólk vóru við. Flagstjaldið gevur ikki altíð bestu ljóðumstøður, men bólkurin og Petur ljóðaðu væl. At ein so ikki so væl hoyrdi sangaran og tað, ið hann segði millum løgini, er onnur søga. Hann er heilt sikkur William og hevur viljan og hjartað á rætta stað og eina æðr, ið pumpar blóð við rockpulsi. Frálíkt!.